# Ein lærari til fýra børn

**Gjáar skúli er millum teir minnu skúlarnir í landinum. Hetta skúlaárið eru bert fýra næmingar í skúlanum**

SKÚLAGONGD
*Dia Johansen*
*Myndir: Jens Kr. Vang*



*Jan Thomsen er lærari í Gjógv. Og hann trívist væl*

**Gjógv:** Í Gjáar skúla eru bert fýra næmingar og ein lærari. Skúlin er væl útgjørdur við teldu og øðrum hentleikum.

Børnini ganga í 1., 2., 4. og 5. flokki. Í 6. flokki gongur Fía Kristiansen. Hon er einasti næmingurin í flokkinum, og hevur 25 tímar um vikuna.

Vit vóru í skúlanum hósmorgunin, og tá hevði hon danskt. Hon las søgur úr eini bólk, sum kallaðist fyri "Fabler". Skúladagurin hjá henni er vanliga frá kl. 8:00 til middags.

Týsdagar eru øll børnini í Stranda skúla til ítrótt, saman við børnunum úr Funningi og Funningsfirði. Tá eru tey eini 15-16 í tali. Tey hava eisini annað samstarv enn ítrótt. Tey møtast regluliga til handalig fak, so sum køk, evning og smíð.

Í frítíðini plagar Fía Kristiansen at spæla við systkini, m.a. við systur sína, Jacobinu, sum gongur í 4. flokki. Tær hoppa band ella spæla í ánni. Men tá ringt veður er, plaga tær at spæla kort ella teldu.

Fía gongur í Gjáar skúla fram til 7. flokk. Tá hon fer í framhaldsdeildina verður tað í Felagsskúlanum á Oyrarbakka.



*Fía Kristiansen er einasti næmingurin í 6. flokki. Hon kundi gott hugsað sær at havt onkran annan á sama aldri í flokkinum*

Ferguson:
## United kann vinna Premier League

**Venjarin hjá Manchester United, sir Alex Ferguson er sannførdur um at hansara felag fer at klára seg sera væl í Champions League. Hann er so sannførdur, at hann veruliga heldur at teir reyðu devlarnir fáa steypið**

FÓTBÓLTUR
*Dia Johansen*

- Hví ikki? Vit eru nógv betur fyri í ár enn síðstu sesong, og eg haldi veruliga at vit kunna gera tað gott hesa ferð. Eg haldi, at vit hava nógvar sera góðar spælarar.

- Fyrst og fremst teir ungu, so sum Rooney og Ronaldo, men eisini Darren Fletcher og John O'Shea vænti eg mær nógv burtur úr, sigur Ferguson við Teamtalk.com.

- Vit hava eisini aðrar framúr góðar spælarar, so sum Park, sum kláraði seg framúrskarandi í PSV í síðstu sesong. Hann hevur eisini gjørt meg sera bilsnan, sjálvt so tíðliga í kappingini. Og tá vit hava ein Ruud Van Nistelrooy í toppformi, so hava vit møguleika at spæla upp í móti hinum stóru liðunum, endar tann snarsinti skotin.

# Samla pengar til Danmarkarferð



*Her taka tey eplir upp – vinstrumegin: Hans Debes, Oyri; Ragnar Fróði Borðoy, Oyrarbakki; Jónbjørg Dahl Ennigarð, Oyri og Esther Kristiansen, Norðskála*
*mynd: Jens Kristian Vang*

**7. flokkur í Norðskála-Oyrar skúla tóku hósdagin upp eplir. Tey skulu seljast til frama fyri Danmarkarferð**

SKÚLAGONGD
*Maria B Hansen*

**Oyrarbakki:** - Vit skulu selja eplini. Tey eru væl vaksin, og vit senda skriv heim til foreldrini í 1. flokki um at keypa tey.

- Vit skulu samla pening inn, tí vit skulu til Danmarkar næsta ár, siga tey.

Prísurin er sera rímiligur fyri føroysk epli - 2,5 kg av eplum fyri 20 kr.

- Vit ætla eisini at hava biograf, diskotek og basar fyri at savna inn pening, siga tey.

Tey eru 6 næmingar í flokkinum, men tvær gentur vóru ikki í eplaveltuni, tá vit vitjaðu tey.

- Hettar er sera spennandi, siga næmingarnir.